

**Kári á Rógvi**
*løgtingsmaður og doktari í lóg*

# Alt vald frá Føroya fólki!

*Notatið hjá justitsministeriinum var bluff. Ráðandi fakliga sjónarmiðið er, at lond og tjóðir sum vit hava stóra nyttu av egnari grundlóg í felagsskapi. Men hvat skal standa í?*

Vit kunnu flokka fatanir av stjórnarrætti í tveir bólkar. Tey ið halda valdið koma frá harðskapi; og tey ið halda valdið koma frá undirtøku. Hetta seinna sjónarmiðið liggur t.d. undir amerikansku óheftislýsingini frá 1776, norsku grundlógini frá 1814 og donsku ríkisgrundlógini frá 1849. Hitt fyrra sjónarmiðið, sum t.d. Mao Tse Tung stendur fyri ("valdið kemur úr byrsumúlanum"), er tíverri komin inn sum faklig spilla hjá teimum, ið lósu jura í Kjøbinhavn fram til 1990'ini. Hesi fólkini hava eisini lært ymiskt, sum hvørki hevur søguligt ella felags europeiskt jørðildi, t.d. trúgva tey, at ALS ikki er lov (don't ask), at talufrælsið bert er formligt (at alt kann bannast), og at Danmark knappliga gjørdist eindarstatur (Føroyar eru at meta við Amager, stóð at lesa í lærubókini á K.U.).

At hava lisið statsrætt á Københavns Universitet í farnum tíðum má hava verið nakað sum í Moonrørsluni ella kanska onkrari asketiskari oyðimarkarsekt, tí tað ger fólk undarliga hugsjónarliga tváaði og pírin. Ein juristur, sum enntá hevur verið virkin í fótbóltssambandinum, ið eftir donsku teoriini ikki kann vera limur í altjóða felagsskapum, har Danmark longu er við, skrivaði í bløðunum, at føroysk stjórnarskipan ber ikki til – 'tí hann hevði onki lisið um hana á K.U.' – svarandi til at siga 'nú sigur Einstein, at alt er relativt; onki stóð um tað í lærubókini á K.U. fyri 20 árum síðani!'

Betra og rættara sjónarmiðið í stjórnarrætti er hetta: Føroyingar er eyðsýndir at staðfesta, teir eru tjóð, búgva í landi, sum í øldir hevur verið egið løgdømi við egnari óskrivaðari stjózrnarskipan, egnum tingi, lógum, venjum og rættindum. Í mangar øldir vóru teir tengdir at sama kongshúsi sum mong onnur lond, men donsk nationalisma og serliga faklig fanatisma frá sonevndum juridiskum positivistum hava forðað fyri teirri norrønu loysnini við egnari skrivaðari stjórnarskipan – sum Noreg hevði frá 1814, og Ísland hevði frá 1874 – uttan at loysa frá samveldisstøðuni. Teir ópragmatisku positivistarnir fækkast tó nú í tali, og hitt so kenda notatið frá 2. juni 2010 var bert roynd at bluffa við óhaldbarum sjónarmið (men bluffið eydnaðist so ímóti løgsøgumanni føroyinga). Vísi til grein í komandi útgávu av tíðarritinum Juristen fyri tey serliga áhugaðu.

## Í Føroyum skulu føroyingar ráða

Í uppskotinum um stjórnarskipan siga vit sum Andrass Samuelsen á sinni, at í Føroyum skulu føroyingar ráða. Alt vald kemur frá Føroya fólki, tí er stjórnarskipanin fremri enn danska ríkisgrundlógin, sum tó sjálvandi skal virðast í framhaldandi samveldi, men hon er fyrst og fremst Danmarkar innlendis stjórnarskipan. Broytingar skulu gerast, ja; men ikki í ásetingunum um tjóðskaparspurningin. At valdið kemur frá fólkinum, at sjálvsavgerðarrætturin er ómissandi, at stjórnarskipanin er evsta skjalið, at støða okkara nú er sáttmálakend samveldisstøða, at føroyingar kunnu hava egnar ásetingar um mannrættindi og rættarskipan – har verður onki broytt.

Nógv umrøddu neyðugu broytingarnar skulu gerast á økjum, har danska grundlógin er fátækslig, serliga innan nútíðar rættindi sum fyrisitingarrættindi, tilfeingi, umhvørvi og orðing av rættargrundreglum sum líkaregluni, umframt á økjum, sum í dag standa illa hagreidd í teirri vánaligu stýrisskipanarlógini, sum vit mugu loysa av við meiri fullbornari stjórnarskipan.

Alt vald í Føroyum kemur frá Føroya fólki, allir myndugleikar mugu hava undirtøku frá fólkinum.

**Mourits Mohr Viderø**

# Hvør er kristin?

Kært barn har mange navne: Frelstur, føddur av nýggjum, endurføddur, trúgvandi, Jesu lærusveinur, komin við, umvendur, náðaður syndari, Guds barn, ja vel sjálvur/sjálv.

Eg vil siga, at tað at blíva *frelstur*, fyri at velja *eitt* heiti, út frá Bíbliuni og av egnum royndum má koma frá Gudi fyrst og fremst.

Tú má fara ígjøgnum eina tíð, dagar, vikur, mánaðir ella ár, har tú er kallaður av Gudi til frelsu. Ein ófriður innaní tær um lívið aftan á deyðan. Hvar endi eg?

Tú má hava hoyrt evangeliið um Jesus, og sæð teg sum ófullkomnan uttan Jesus, men náðaðan gjøgnum Jesus. Og tað er bara Gud, sum kann opna henda sannleikan fyri tær.

Tín partur er at trúgva tí, velja tað, sum Gud vísur tær gjøgnum Sítt orð: Bíbliuna og gjøgnum tey, sum tala Guds orð ella vitna um Hann.

Mín egna roynd er, at eg var so sterkt kallaður av Gudi, at eg tonkti als ikki um alt eg skuldi leggja av, og gevast við, og um hvat onnur fóru at siga, um eg fór at klára alt hetta, hvat við vinunum, og allir hesir klassikarnir.

Gud málaði Jesus so týðuliga fyri mær, at Hann – Jesus – var loysnin, at eg vildi hetta bara so nógv, sum man kann hugsa sær. Og nakað væl afturat.

– Lat meg bara siga tað beinanvegin: Jesus **var**, og **er** loysnin, og tað so grúðuliga og ógvuliga nógv meir enn eg hugsaði. Ja, eg minnist ikki ein gang, hvussu nógv eg hugsaði um hvussu tað fór at verða. Eg vildi bara verða tryggur, og tað skjótast gjørligt. Nå aftur til har eg kom til.

At greiða frá hvussu lívið er saman við Jeusus, er ómøguligt at gerða við menniskja orðum. So stórt og langt oman fyri okkara vit er tað. So ein sovorðin roynd hjá mær er bara ein lítil biti av tí heila. Tað kann bara fatast um ein sjálvur er frelstur.

Og har en nemliga ein av fylgjunum av at verða føddur av nýggjum: Ein nýggj verð byrjar, tú kemur inn í eina nýggja dimention. Wow, tað passar. Eg eri har nú.

Tú kemur frá trúgv nærmast til skoðan, vil eg pástanda.

Friður; hvør vil ikki uppliva frið. Ein túr út í náttúruna, langt burt frá øllum larmi. Burt frá tí stressaða degnum. Burt frá tí fíggjarliga trykkinum, sum hongur yvur einum sum ein tung byrða. Burt frá einum stressaðum arbeiði.

Bara hoyra fuglasang, og áartutl. Bara frið.

Men tann friðurin varðar ikki longur, enn til vit eru í øllum tí stressandi aftur.

Her er ein av fylgjunum, sum eitt lív saman við Jesusi gevur: Frið. Ein varandi frið. Ein frið við varðandi fuglasangi og áartutli. Frið fyri tí dagliga. Ein friður, sum yvurgongur alt vit. Frið, ikki sum heimurin gevur, men frið Jesusar, sum skriva stendur.

Tað ræður um at halda seg nær Jesusi, so tætt sum møguligt. Tað kann ikki sigast ov ofta: Halt teg tætt at Jesusi, bið, les orðið, kom saman við teimum trúgvandi.

Bara við at skriva hetta verði eg upplyftur, líkasum nærri Jesusi.

Og hvør vil ikki tað. Hann, sum elskaði við tí rætta kærleikanum, Agape, sum ikki krevur nakað afturfyri. Jesus, sum gav seg í deyðan fyri okkum øll, fyri at vinna okkum frælsi. Ikki frælsi frá Danmark, ella onkrum sovornum, men frælsi frá syndini, sum hongur so tung yvur menniskjanum, um tey vita tað ella ikki. Tí tað, sum tyngjur menniskja er syndabyrðan, samvitskan. Og alt hetta barð Jesus upp á træði. Hann kann seta ein og hvønn fríðan frá tyngd og skuldarkenslu.

Hann gjørdi tað fyri meg, og Hann kann eisini gerða tað fyri teg. Bara tú vil.

At verða kristin, er at fylgja Jesusi eftur, hava valt Hann sum nummar 1.

Kristin gjøgnum allar tíðir eru blivin forfylgd, og nógv heilt til deyðan.

Ikki uppliva vit tað stóru forfylging her á landi, men tað kann koma. Tann kristni má vera klárur til andaligan bardaga, og uttan at halda seg tætt at Jesusi, koma vit ikki at verða standandi.

Óansað hvat øll tey klókastu menniskjuni í hesum heimi siga, so er Jesus svarið uppá alla heimsins neyð og elendigheit.

Líkasum menniskja ongan varandi og veruligan frið kann fáa uttan Jesus, verður ongin friður í heiminum uttan Jesus, friðarhøvdingan.